## Veðrið



**Fimmdagaforsøgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi, seinni av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið Kristi Himmalsferðardag:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av landnyrðingi og stundum regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og regn av og á. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.



# Hugtakandi songløta í Fuglafjarðar kirkju

*Fuglafjarðar Gentukór hevði sera væleydnaða konsert í Fuglafjarðar kirkju seinasta fríggjadag*

Enn einaferð hevði Fuglafjarðar Gentukór undir leiðslu av Frits Johannesen eina sera væleydnaða konsert. Konsertin var í Fuglafjarðar kirkju við sra fjølbroyttari skrá.

Kórið skal seinni í summar á konsertferð til Danmarkar og fingu vit at hoyra nakað av tí skránni, sum kórið fer at framføra í Danmark.

Tað er sera hugtakandi at hoyra, hvussu væl Frits dugir at fáa burtur úr ungu songrøddunum. Her er ikki bert talan um vakrar føroyskar sangir, men eisini svenskir, norskir, danskir, íslendskir og eingilskir sangir vóru á skránni.

Men Frits fer munandi víðari. Gentukórið framførdi so sanniliga eisini sera vakra og krevjandi verkið For the Beauty of the Earth eftir S. Pierpoint og John Rutt erog Kyrie og Agnus Dei satsirnar úr Messe af Bent Fabricius. Her liggur eitt sera stórt arbeiði aftanfyri bæði hjá leiðaranum gentunum.

At Fuglafjarðar Gentukór er á einum ser ahøgum støði, er onki at taka seg aftur í. Tað sýnir skráin. Hetta er ein skrá, sum onki er aftan fyri tær skráir, sum bestu sangkórini í landinum framføra.

Tað var eiisnie in frøi at síggja og hoyra tær tríggjar Vár, Eilin og Katrin sum solistar. Hvussu rólig aog vakurt tær framførdu sín solosong. Tær tyktust senuvandar. Og Vá við síni vøkru rødd syngja Heiðafuglur syngur, sum um songurin kom oman av Blábjørg.

Konsertin endaði við Gakk tú tryggur við vakra lagnum hjá Jógvan á Lakjuni, har áhoyrararnir sungu við og alt kirkjurúmið fyltist út í hvønn krók – vakurt og hugtakandi.

Fuglafjarðar Gentukór fer at vera ein góð umboðan fyri ikki bert Fuglafjørð, men fyri alt føroyaland á uttanlandsferð síni í summar.

Tøkk fyri, Frits og Gentukórið. Og Heðin og Eyðun fyri fylgispæl.

*Áhoyrarar*




Lágtrýstið vestanfyri Føroyar grynnist.




Djúpa lágtrýstið yvir Atlantshavinum á 49N-29V fer móti Bretsku Oyggjunum og gevur vind og avfall á okkara leiðum fríggjadagin.




**Hitalagið mált frá 29./05. kl 06⁰⁰30./05. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,8°C**
Minsti hiti máldur í mai: **÷3,0°** Mesti hiti máldur í mai: **19,7°**




Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 29./05. kl 6⁰⁰–30./05. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í mai: 21,1 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 1 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 15 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannahavn | 10 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 28 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 13 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 25 |
| Athen | 26 |
| Malta | – |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 12 |
| New York | 17 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 27 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 18 |


sosialurin
www.sosialurin.fo

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG





12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes


## Vestfalskyrrindi

22. mai: Mánin longst frá jørðini
26. mai: Seinna kvarter
2. juni: Tendring
3. juni: Mánin næstur jørðini

Kelda: Skipalistin 2000

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. mai | 5.38 | 18.05 | 4.38 | 17.05 | 4.53 | 17.20 | 7.38 | 20.05 | 8.38 | 21.05 | 3.53 | 16.20 | 2.53 | 15.20 | 5.53 | 18.20 | 6.53 | 19.20 | 5.23 | 17.50 | 6.38 | 19.05 |
| 1. juni | 6.27 | 18.52 | 5.27 | 17.52 | 5.42 | 18.07 | 8.27 | 20.52 | 9.27 | 21.52 | 4.42 | 17.07 | 3.42 | 16.07 | 6.42 | 19.07 | 7.42 | 20.07 | 6.12 | 18.37 | 7.27 | 19.52 |
| 2. juni | 7.13 | 19.34 | 6.13 | 18.34 | 6.28 | 18.49 | 9.13 | 21.34 | 10.13 | 22.34 | 5.28 | 17.49 | 4.28 | 16.49 | 7.28 | 19.49 | 8.28 | 20.49 | 6.58 | 19.19 | 8.13 | 20.34 |
| 3. juni | 7.54 | 20.15 | 6.54 | 19.15 | 7.09 | 19.30 | 9.54 | 22.15 | 10.54 | 23.15 | 6.09 | 18.30 | 5.09 | 17.30 | 8.09 | 20.30 | 9.09 | 21.30 | 7.39 | 20.00 | 8.54 | 21.15 |